

Vallhall-boripallurin í Norðsjónum. Mynd: BP

# Fleiri boripallar fingu arbeiði í september í Evropa

Jógvan Hugo Gardar

07.10.2014 - 13:53

Oljan.fo

Ein fesk frágreiðing um virksemi hjá oljuboripallum vísir at talið heldur sær í Evropa, men í heiminum er talið minkandi.

Sambært boripall-frágreiðingini hjá Baker Hughes, ið offshore.no vísir til, er talið á boripallum sum vóru í virksemi í Evropa í september 50. Hetta eru fimm fleiri enn teir 45 sum vóru í virksemi í august. Samanborið við september í 2013, so er talan um eina minking við einum boripalli.

Hyggja vit hinvegin eftir hvussu nógvir boripallar eru í virksemi í heiminum, so vísa tølini at 333 vóru í gongd í september. Hetta er ein munandi afturgongd, samanborið við august, tá 353 boripallar vóru virknir.

Afturgongdin er størst í Miðeystri, har 10 færri vóru í arbeiði, meðan Evropa og Avstralia eru einastu økini har fleiri pallar komu í arbeiði í september.

Í USA og Kanada vóru 66 boripallar virknir bæði í august og september.